# Føroyska innrás



Ein av stóru donsku talvkappingunum er Politiken Cup, har føroyingar ofta taka lut. Og 2008-útgávan av kappingini er einki undantak í so máta.. Kappingin er ein gyltur møguleiki, hjá - ikki minst - ungu talentum okkara, at tilogna sær altjóða royndir, í einum umhvørvi sum uppá allar mátar er ekseptionelt gott. Sera hugalig luttøka er frá Høgna (11) og Rógva Egilstoft Nielsen (15), úr Sandavági, Hjalta Toftum Jógvanssyni (15), úr Havnini, Ársins Stjørnuskoti 2007/08, unglinga-FM vinnaranum, Herborg Hansen (17), úr Klaksvík og Vagni Dam (16), úr Róki (Sundalagum). Unglingar ávegis, har tað verurliga gerst spennandi. Ein mánað undan kappingarbyrjan, eru 184 telvarar tilmeldaðir - og vónandi eru enn fleiri føroyingar, sum taka av spennandi gylta møguleikanum, skrivar heimasíðan hjá Talvsamband Føroya.

# Guttorm og Fríðunn vunnu

FM-kapping á 10 kilometra-teininum í renning varð hildin í Runavík týskvøldið. Hjá kvinnum var Fríðunn Steinberg skjótasti rennarin, og kom hon á mál í tíðini 43,55 minuttir – ein lítlan minutt undan Rannvá Djurholm, sum gjørdist nummar tvey. Hjá monnum kom Guttorm Sørensen á mál í tíðini 33,39 minuttum, og vann hann soleiðis framman fyri Sam Vang og Regin Zachariasen. Fyri menn eldri enn 45 ár var Regin Zachariasen skjótastur, og í elsta bólkinum, sum var fyri menn eldri enn 55 ár, vann Krisjan Christiansen kappingina.



*Katrin Olsen og Julianne Elander skulu um sjey vikur undir størstu avbjóðingina nakrantíð. Kortini hava tær um dagarnar havt stundir til eina lítla vitjan í Føroyum. Her avmyndaðar saman við Edvard Heen, tryggingarstjóra*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

sjálvsagt fokusera tær nógv uppá matin. Tær hava verið so nógv ár í toppítrótti, at tær kenna mørkini, tá tað kemur til mat, hvat ein eigur at eta, og hvat ein ikki má eta.

Katrin letur ongan iva verða um, at hon og Julianne fara eftir heiðursmerkjum í Beijing. Sæð í ljósinum av, hvussu gott tað gekk við HM í Onglandi í fjør, tá tær vunnu silvur, so halda tær avgjørt, at tær standa við einum góðum møguleika at vinna heiðursmerki. Men tær eru fullgreiðar yvir, at har eru fleiri bátar um boðið, so talan verður um eina beinharða kapping, har einki verður givið við dyrnar.

Katrin leggur dent á, at bara at koma í finaluna verður hart í sær sjálvum, men koma tær í finaluna, so verður so tætt millum bátarnar, at alt er møguligt tá.

10. August rógva tær teir innleiðandi róðrarnar. Um tað gongst væl við teir fyrstu róðrarnar, og eru tíðirnar optimalar, so kunnu tær vinna seg í finaluna beinavegin. Vinna tær seg ikki í finaluna beinavegin, so bjóðst høvið aftur í hálvfinaluni. Men í einari hálvfinalu skal ein verða millum 3 teir fremstu bátarnar fyri at vinna seg í finaluna.

Tær báðar fara til Beijing 2. August, átta dagar áðrenn fyrsta kappingin hjá teimum stendur á skránni. Áðrenn tær fara til OL í Beijing, fara tær á venjingarlegu í Eysturríki. Tær hava valt Eysturríki, fyri at fáa eitt gott venjingarumhvørvið við frískari luft og góðum venjingarumstøðum. Julianne metir, at eru tær í Beijing 8 dagar áðrenn kappingina, so skuldu tær nátt at vant seg við veðurlagið og umstøðurnar í Kina.

Tær koma at búgva beint við róðrarøkið í Beijing, og er tað ein fyrimunur, sum tær fegnast um. Men tá tær eru lidnar at kappast – tað verður aftaná ta fyrstu vikuna - flyta tær inn í tað Olympisku Bygdina, fyri at kunna verða saman við hinum donsku ítróttarfólkunum, eisini fyri kunna stuðla teimum í teirra kappingum.

## Glað fyri føroyska stuðulin

Spurd, um hon fer at markera eitt møguligt olympiskt heiðursmerki á nakran serstakan hátt, svarar Katrin, at so langt hevur hon ikki hugsað enn. Men sjálvsagt verður talan um ein stóran dag, og liggur tað djúpt í Katrini, at hon er føroyingur, og fer tað eisini at kennast, sum ein vunnin heiður fyri heimlandið.

Tað hevði givið henni ein stoltleika í sinnið at vunnið eitt olympiskt heiðursmerki, bæði sum føroyingur, og sum ein íðkandi á olympiska liðnum hjá Danmark. Og verður talan um eitt heiðursmerki, so er sjálvsagt, at Katrin skal heim til Føroya at luta gleðina saman við familju, vinum, kenningum og stuðlum.

Rós frá føroyingum hitar, og hevur stóran týdning fyri Katrina. Fyri Katrin og onnur føroysk elitu-ítróttarfólk er einki val, ein kann ikki umboða Føroyar til olympisku leikirnar, um ein so gjarna vildi tað. Katrin býtir tað ikk upp, men onkursvegna kennir hon tað, sum umboðar hon bæði Danmark og Føroyar til OL í Beijing.

Tað hevur ikki ligið fyri hjá Katrini at verða so nógv heima í summarfrí síðstu árini, tí hásesongin innan rógving, er júst um summarið. Men Katrin følir ikki, at hon hevur givið avkall uppá nakað, tí rógvingin hevur givið henni nógvar góðar upplivingar. Hon velur heldur at hugsa um allar møguleikarnar, sum hon hevur fingið við rógvingini.

Men sjálvsagt er, at tað ikki altíð liggur líka væl fyri at fylgja við hvat hendir heima í Føroyum, og tað fer ofta framvið, hvør hevur átt børn og soleiðis.

Katrin hevur lisið til lækna, hon hevur skrivað sína uppgávu, og skal upp til tað endaligu próvtøkuna um nakrar fáar dagar. Hon ætlar at byrja í læknastarvi tann 1. Oktober. Aftaná OL - sum alla tíðina hevur verið aðalmálið hjá Katrini - verður ikki líka nógv venjing á skránni. Tað verða nógv ting at seta seg inní, sum nýútbúgvin lækni, so tíðin má vísa hvat Katrin fær tíð til innan rógving. Henni dámar at rógva, men aftaná OL verður kanska talan um at venja 3-4 ferðir um vikuna, ella alt eftir hvat tíðin fer at loyva.

Spurd um hon kanska gerst venjari í framtíðini, so er tað ein leiklutur, sum hon ikki dugir at síggja seg sjálva í, enn. Men hon heldur, at tað er altíð stuttligt at kunna geva øðrum nøkur góð ráð, og at kunna inspirera onnur.

## Katrin og Julianne á Rás2

Samrøðan við Katrin Olsen og Julianne Elander, verður eisini at hoyra á Rás2. Hetta verður mánamorgunin 30. juni klokkan 10.

RÁS 2 ...títt radio